## Regin um fótbólt

Eg eri HB'ari. Men eg má helst venja meg við eisini at halda við Suðuroyarliðunum, nú eg fari suður har at búgva. Eg havi spælt eitt sindur fótbólt – sum málmaður – og mær dámar framvegis væl at spæla innandurafótbólt.



## Regin um modellflúgvarar

Í fjør keypti eg, saman við beiggja mínum, ein modellflúgvara, og tað hevur verið eitt hobby hjá mær síðani. Mær dámar væl at fara út við flúgvaranum, tí tað er avstressandi. Nú eg flyti til Suðuroyar, má eg finna mær onkra nýggja alliansu har suðuri, men eg veit ikki, um nakar flýgur við modellflúgvara í Suðuroy.



## Fakta

**Navn:** Regin Vágadal
**Aldur:** 37 ár
**Bústaður:** Tórshavn
**Hjúnastøða:** Stakur
**Útbúgving:** Skipsførari og merkonom
**Starv:** Stjóri á Strandfaraskipum Landsins

*- Eg sleppi ikki undan, at eg var tann sterki maðurin, og tað kemur helst at forfylgja mær í nógv ár afturat. Tað er ein eingin trupulleiki hjá mær, og bakgrundin sum tann sterki maðurin er ofta ein góður innfallsvinkul til fundir ella samrøður við fólk, sigur Regin Vágadal. Mynd: Jens Kristian Vang*

hann verið til nú, hann er blivin stjóri á Strandferðsluni.

– Lívið er fult av tilvild, og tað var rættiliga tilvildarligt, at eg av fyrstan tíð kom á Strandferðsluna at arbeiða. Mær hevur tó dámt sera væl her, og tí havi eg verði her síðani. Hetta hevur verið ein spennandi og lærurík tíð, og tað er ein stór avbjóðing at verða stjóri á Strandferðsluni – ikki minst tú stovnurin skal flyta.

– Á Strandferðsluni hevur tú samband við sera nógv fólk og fyritøkur, og sum stjóri mást tú duga at umstilla teg til ymiskar samtalur við ymisk fólk. Eg er eitt kappingarmenniskja, og mær dámar væl stórar og spennandi uppgávur, so hetta passar mær sera væl, sigur Regin Vágadal.

Hann er sostatt ein av teimum, sum heldur fram at arbeiða á Strandferðsluni, hóast stovnurin við ársskiftið flytir til Suðuroyar.

– Umleið ein triðingur av starvsfólkunum eru farin, og onnur eru komin í staðin. Vit hava tíverri mist nógv góð fólk, men tíbetur hava vit eisini fingið nógv góð fólk í teirra stað.

### Flytir sjálvur til Suðuroyar

Regin Vágadal ætlar sær ikki at pendla úr Havn til arbeiðis á Strandferðsluni í Suðuroy. Hóast Smyril er ein góð ferja, og siglingartíðin nú bert er slakar tveir tímar, so rykkir Regin teltpelarnar upp í Havn og fer til Suðuroyar at búgva.

– Íbúðin hjá mær stendur til sølu, og um eg fái nóg mikið fyri hana, selji eg hana. Í øllum førum flyti eg til Suðuroyar at búgva, sigur hann.

– Eg havi ikki familju sjálvur, og tí er tað lættari hjá mær at flyta soleiðis. Eg havi fyrst og fremst meg sjálvan at hugsa um, og hóast eg ongantíð havi ímyndað mær, at eg skuldi fara til Suðuroyar at búgva, so eri eg spentur til tað. Eg eri nokk so líkatil, og eg trívist vanliga, har eg eri.

– Eg kenni onkur fólk í Suðuroy, og mær dámar væl suðuroyingar. Fyrstu ferðinar, tú kemur í samband við onkran illan suðuroying, kanst tú blíva eitt sindur kløkkur, tí teir kunnu verða eitt sindur ógvusligir. Men teir meina einki ilt við tað, og eg haldi faktiskt, at teir eru herligir og ótrúliga skemtingarsamir. Suðuroyingar eru, eftir mínum tykki, ikki tað fólkaslagið sum liggur inni við tingum – teir siga tað sum teir hava uppá hjarta, og tað er gott, sigur Regin Vágadal.

### Demokratisk leiðsla

Regin Vágadal er ikki tann harði og sterki leiðarin, sum tekur allar avgerðir sjálvir. Hann vil heldur útdelegera, og legggur dent á, at fólk fáa ábyrgd og heimildir sum samsvara. Stalin segði, "álit er gott, men kontroll er betur", eg sjálvur haldi at kontroll er gott, men álit er betri.

– Tann gamli leiðsluhátturin var kæft-trit-og-retning, men tað eru nógv ár síðani, at hann fór í søguni. Nú snýr tað seg um at arbeiða saman við starvsfólkunum, hava eina demokratiska leiðslu og útdelegera uppgávur. Tað passar mær sera væl, sigur Regin Vágadal.

– Tað kann sjálvandi verða neyðugt hjá einum stjóra at taka avgerðir sjálvur og geva harraboð, men tað geri eg ikki uttan, at tað er neyðugt.

Starvið sum stjóri á Strandferðsluni kann verða útsett, og bæði vanlig fólk og politikarar hava sínar meiningar um Strandferðsluna, men hetta nervar ikki nýggja stjóran.

- Hetta er ein partur av stjórastarvinum á Strandferðsluni, men og tað taki eg sum tað kemur rørir meg ikki. Eg toli eitt sindur av hvørjum, og tað er ikki alt, sum eg tími at svara til, sigur Regin Vágadal.

Sosialurin